


# Sum árini ganga við Hjalta Skaalum

NÝGGJ FLØGA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

"Sum árini ganga" er heitið á nýggjari fløgu, sum Hjalti Skaalum gevur út 2. november. Sjálvur sigur Hjalti, at hetta er dreymur, sum gjørdist veruleiki. -Tá hugsað verður um, hvussu nógvar fløgur verða givnar út í Føroyum árliga, so havi eg av og á umhugsað, at skuldi møguleikin einaferð verið til staðar, so vildi eg geva mítt íkast til føroyska fløgumarknaðin, - eitt "alternativ" til hinar góðu fløgurnar, sum annars koma út sigur Hjalti og vísir á, at í Føroyum koma, í mun til fólkatalið, ótrúliga nógvar góðar fløgur út, og hann heldur tað vera undrunarvert at hoyra, hvussu nógvar góðar tónleikarar vit hava.

## Útlendsk løg í føroyskum búna

Sjálvur hevur hann í nógv ár havt eitt ítriv, sum hevur við tónleik at gera, og í tí sambandi hevur hann eisini roynt at yrkja og seta løg til hesar yrkingar. Harumframt sigur hann seg hava roynt at umseta (umskriva) útlendskar sangir til føroyskt.

- Tá eg fann útav, at eg hevði nokk av tilfari til eina fløgu, hugsaði eg við mær sjálvum, at nú var tíðin komin til at royna eina fløguútgávu. Eg setti meg í samband við Finnur Hansen, útvarpsteknikara, og spurdi hann, um hann vildi "produsera" eina fløgu fyri meg. Tíbetur játtaði hann, og nú er fløgan so veruleiki við eini blanding av egnum verkum (5) umframt útlendskum løgum í "føroyskum búna" (9) - 14 løg íalt.

Við á fløguni er eisini nógv spælda lagið "Silvurbrúðarvalsurin", sum Ísak N. Jacobsen so hegnisliga hevur føroyskað. Hetta lagið varð innspælt í Útvarpi Føroya tann 21/2 - 1994 av bólkinum "Pauli og vinmenn" í sambandi við tónleikasendingina "Á tónatingi", sum Elis Poulsen skipaði fyri, men varð tó ongantíð givið út á fløgu.

Hjalti sigur, at tað at tulka t.d. Jim Reeves, Vikingarna ella Keld Heick á føroyskum máli, saman við góðum føroyskum tónleikarum, er ein sera áhugaverd avbjóðing, og tá hann nú avgjørdi at innspæla eina fløgu, var tað heilt sjálvsagt, at ein partur av innihaldinum á fløguni eisini skuldi vera onkur góður gamal útlendskur "slagari" í "føroyskum búna".

Innihaldið á fløguni er ein blandingur av dansibands-countrytónleiki og harmoniku-tónleiki. Við stórari hjálp frá Kristian Blak og Michael Reveal eydnaðist tað at fáa øll loyvi viðvíkjandi upphavsrættindum til tey útlendsku løgini upp pláss.

Tað er "TUTL", sum gevur fløguna út, og hevur Jóannes Jakobsen staðið fyri margfalding av fløguni og húsanum.

Allir 14 sangirnir á fløguni hjá Hjalta eru á føroyskum máli.

Finnur Hansen, útvarpsteknikari, hevur sum framleitt fløguna.

### Tónleikarar eru:

| | |
|---|---|
| Hjalti Skaalum: | Sang |
| Rógvu á Rógvu: | Trummur |
| Ólavur Øster: | El-guitar og akuststiskan guitar |
| Arnold Ludvig: | El-bass og akustiskan bass |
| Jákup Zachariassen: | El-guitar, akustiskan guitar og steel-guitar |
| Finnur Hansen: | Kór, harmonika, floyta, klaver ljómborðAkustiskan guitar, mandolin og ásláttur |
| Torkil Johannesen: | Kór |
| Malan Thomsen: | Kór |
| Hans Petur í Brekkunum: | Saxofon |
| Dávur Magnussen: | Trombone |
| Ólavur Olsen: | Trompet |
| Regin Jacobsen: | Harmonika og saxofon |
| Pauli Jacobsen: | Harmonika |
| Óli Jacobsen: | Harmonika |

Teir, sum mannaðu "Pauli og vinmenn", vóru:

| | |
|---|---|
| Á harmoniku: | Pauli Jacobsen, Óli Jacobsen og Johannes Simonsen |
| Bass: | Óli Petersen |
| Guitar: | Ísak N. Jacobsen |
| Guitar og sang: | Hjalti Skaalum |

(Lesið samrøðu við Hjalta um hansara tónleikalív í Vikuskiftisblaðnum)

Størv í Føroya Banka




***Nýskapan og menning eru lyklaorðini til vøkstur, eisini í bankaheiminum. Tað hava vit ásannað og hava tí valt at stovna eina nýggja deild til endamálið. Vit vilja tí savna eitt gott toymi av framfýsnum starvsfólkum at manna deildina. Í hesum sambandi lýsa vit eftir einum verkætlanarfólki og einum samskiftisfólki.***

**Verkætlanarfólk**
Hevur tú visjónir fyri, hvussu bankin kann mennast og mótt upp á at fremja hesar í verki, er tað kanska júst tær, ið vit leita eftir. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstundis vera góður viðleikari í toyminum. Kreativitetur verður settur í hásæti.

**Førleikakrøv**
Tú hevur hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við verkætlanarleiðslu. Royndir frá fíggjarheiminum telja eisini, men eru tó ikki nakað krav. Kunnleiki til mest vanligu telduforritini sum MS Office er eitt krav. Tú skalt klára teg væl á enskum máli, bæði í skrift og talu.

**Samskiftisfólk**
Storytelling, branding, virkismentan og mennandi samskifti eru natúrligir partar av eini fyritøku í menning. Hevur tú førleikarnar og persónligu eginleikarnar til at standa fyri hesum týdningarmiklu uppgávum, hava vit eitt sera avbjóðandi starv at bjóða tær.

**Førleikakrøv**
Tú hevur hóskandi útbúgving sum journalistur ella líknandi. Somuleiðis er tað eitt krav, at tú hevur drúgvar royndir frá miðlaheiminum. Leiðsluroyndir eru ein fyrimunur.

**Løn og setanarviðurskiftir**
Verða avtala nærri samsvarandi útbúgving og royndum.

**Umsókn**
Send tína umsókn við CV til:
Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn,
att: Bjarki Mohr, ella á teldupost starvsfolk@foroyabanki.fo
innan mánadagin 21. november 2005.

Spurningar um størvini kunnu setast Johnny í Grótinum, leiðara fyri Menning & Samskifti, á tlf 311350 ella teldupost **johnny.igrotinum@foroyabanki.fo**, ella Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara á tlf 319937 ella teldupost **bjarki.mohr@foroyabanki.fo**.

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo